# Sorg í Vágum nú P/F Vesturvón er selt

**- Her er einki at gera. Eg havi tikið avgerðina um at selja tey 20%, sum eg umboði í nevndini, sigur Ólavur Petersen, reiðari hjá P/F Vesturvón**

VESTURVÓN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

- Tað er eingin glaður í Vágum, nú ein meiriluti í nevndini í P/F Vesturvón hevur selt 60% av partapeninginum úr felagnum. Eg, sum sjálvur eri í nevndini, visti púrasta av ongum, fyrr enn sølan var framd. Nei, hetta hevði eg ikki væntað, at eg soleiðis fór at standa andlit til andlits við tann veruleika, at felagið fór at vera selt yvir høvdinum á mær og øðrum nevndarlimi, Hugo Fjørðoy, sum heldur ikki visti av nøkrum, sigur Ólavur Petersen, ið er maðurin, sum hevur myndað felagið úteftir.

Í nevndini í P/F Vesturvón eru 5 nevndarlimir; tey eru Frígerð á Mýruni, Fisher Hansen og Jógvan Joensen, sum hava verið við til søluna og Ólavur Petersen og Hugo Fjørðoy, sum ikki ánaðu nakað, fyrr enn alt var yvirstaðið.

## Einki at gera

Ólavur heldur tað vera undarligt, at nevndin aftanfyri felagið ikki varð kallað saman til fundar at viðgera spurningin um sølu av partabrøvum.

- Eg havi nú roynt at sodnað hetta og eri komin til ta niðurstøðu, at her er einki at gera. Avgerðin er tikin, og vit fara at selja partapeningin, sum eg umboði í nevndini.

Ólavur sigur, at partapeningurin, sum hann umboðar, í fyrsta lagi stavar frá pápanum og verpápanum.

- Tey 60%, sum P/F Akraberg nú eigur í felagnum, fara upp á eini 80%, tá ið vit hava selt, sigur hann.

Reiðarin, sum ivaleyst skjótt verður fyrrverandi reiðarin hjá P/F Vesturvón, sigur, at vágafólk og onnur, sum varða av skipunum, eru ógvuliga hørm.

- Fólk hava gingið inn á skrivstovuna at spyrja, hvat nú fer at henda – og hvat tey skulu gera, sigur Ólavur.

Hann heldur tað ikki vera rætt at lasta keypararnar fyri tað, sum hent er, tí teir hava bert keypt partabrøv, sum teimum stóð í boði at keypa.

- Men eg haldi, at tey í nevndini, sum í loyndum avgjørdu at selja, kundu havt handfarið hetta málið øðrvísi, tí tað er hóast alt menniskju, sum eru knýtt at hesi fyritøku, sigur Ólavur.

## Uppsagnir á veg

Á skrivstovuni hjá P/F Vesturvón í Vágum starvast trý fólk, har Ólavur sjálvur er eitt teirra.

- Vit eru her enn, og vit eru øll í sama "báti", men vit vita einki um, hvussu verður.

Ólavur sigur, at hann hevur tosað við Anfinn Olsen, stjóra í Framherja, og teir báðir hava avtalað at tosa saman aftur, tá ið Anfinn kemur heim aftur úr Íslandi.

Einir 30 partaeigarar hava verið í P/F Vesturvón.

- Enn er eingin uppsagdur, hvørki í landi ella umborð, men eg vænti, at vit fara at síggja uppsagnirnar skjótt, leggur Ólavur Petersen aftrat.



*- Enn er eingin uppsagdur, hvørki í landi ella umborð, men eg vænti, at vit fara at síggja uppsagnirnar skjótt, sigur Ólavur Petersen og vísir á, at tað er sorg í Vágum, nú P/F Vesturvón er selt*




*Reiðarin, Ólavur Petersen, sum ivaleyst skjótt verður fyrrverandi reiðarin hjá P/F Vesturvón, selir nú eisini tey partabrøv, sum hann umboðar í nevndini*

# Fleiri hava siglt við skipinum í 25-30 ár



*Væntandi er, at eigaraskiftið kemur at ávirka gerandisdagin hjá nógvum familjum, sum í mong ár hava havt sítt livibreyð umborð á flakatorlaranum, Vesturvón*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Hóast eingin enn er uppsagdur, hvørki á landi ella á sjógvi, sum hevur starv hjá felagnum, P/F Vesturvón, er líitð at ivast í, at nakrar uppsagnir verða í næstum**

VESTURVÓN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tann stóri spurningurin er, hvør kemur at manna flakatrolaran, Vesturvón, nú P/F Framherji á Toftum, sum nýliga hevur selt flakatrolaran, Akraberg, eigur meirilutan í felagnum.

Ólavur Petersen, reiðari hjá P/F Vesturvón, sigur, at nógvir av monnunum, sum sigla við flakatrolaranum, hava siglt við skipinum í mong, mong ár.

- Umleið helmingurin av manningini, sum telir 36, er úr Vágum, og onkur av teimum hevur verið við skipinum í eini 30 ár.

Ólavur vísir á, at einir 5 suðuroyingar eisini eru umborð á Vesturvón, og hesir hava siglt við skipinum í upp til eini 25 ár.

- So, tað er greitt, at hetta kemur at ávirka gerandisdagin hjá mongum familjum, bæði her vesturi og aðrastaðni.

## Eingin útskifting

Reiðarin sigur, at rættiliga lítil – ella eingin - útskifting hevur verið við manningini umborð á Vesturvón.

- Tað hevur verið soleiðis, at teir, sum eru farnir av, í flestu førum eru givnir fyri aldur – ella av øðrum orsøkum. Hetta hevur verið ein góður kjansur, sum hevur kastað væl av sær, og tí hevur eingin trupulleiki verið hjá skipinum at hildið upp á fólkið, sigur Ólavur Petersen.